Runavíkar Kommuna

## Starvsfólkum til nýtt autismutoymið í Runavíkar kommunu

Frá 1. mai 2009 og fram til summarfríðtíðina byrjar eitt nýtt heildartilboð í Glyvraskúla í umfatar 4 børn. Tilboði kemur at halda fram eftir summarfrítíðina, sum fríðtíðartilboð eftir skúlatíð. Fyri summarfrítíðina verða stuðulstímar leysir at søkja í skúlapartinum av tilboðnum, sum kunnu samskipas við størv í frítíðarpartinum.

**Søkt verður eftir:**
3 til 4 pedagogum ella serkønum fólki 25/40t um vikuna

Fyrimun hava umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum innan økið!

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru fyrikomandi, ígongdsetandi, engasjeraði og hugaði fyri toymissamstarvi. Vit vænta, at tú ert jaligur, opin og lagaligur. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av einum toymið, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

**Størvini verða sett soleiðis:**
frá 1. mai 2009 ella eftir nærri avtalu, fram til 18. juli 2009, við møguleika at halda fram eftir summarfríðtíðina. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í starv. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Jákup Foldbo, sosialdeildarleiðari tlf. 417095 ella Eyðnu Norðfoss, leiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 29. apríl 2009, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**

Postboks 139 · Heiðavegur 26 · FO-610 Saltangará

# Sølufólk við vinnuinnliti søkist

### TRYGD leitar eftir sølufólki til vinnudeildina

**STARVIÐ**
Talan er um eitt sera frítt, sjálvstøðugt, spennandi og avbjóðandi starv, har høvuðsábyrgd tín verður at selja tryggingar til vinnukundar og ráðgeva teimum. Samstundis fært tú ábyrgdina av einum kundabólki, sum skal hava virkna kundarøkt.

Stórur dentur verður lagdur á at koyra út til bæði verandi og nýggjar kundar við sølu og kunning í hyggju. Í sambandi við sølu kann roknast við nakað av umsitingarligum uppgávum. Upplæring syrgir TRYGD fyri, og saman við starvinum fylgja møguleikar fyri útbúgving á tryggingarakademinum umframt onnur útbúgving eftir tørvi.

**TÚ**
Tú ræðist ikki avbjóðingar og dugir væl at selja. Tú trívist væl við at arbeiða sjálvstøðugt, ert jasøgin, dugir væl at samstarva og tekur ábyrgd. Tú arbeiðir eisini skjótt og hevur sjálvandi handilsligan sans. Kunnleiki til føroyskt vinnulív er ein fyrimunur.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**
Starvið verður sett og lønt eftir sáttmálanum millum Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggingarstovnar og Finansforbundet.

Vit vilja seta starvið sum skjótast, men eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum. Skrivlig umsókn við avritum av viðkomandi skjølum um útbúgving og arbeiðsroyndir skal vera okkum í hendi innan 21. apríl 2009.

Send umsóknina til: P/F TRYGD, att: Jean Djurhuus Gongin 7, boks 44, 110 Tórshavn ella til jdj@trygd.fo.
Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Ellu Mortensen, leiðara á vinnudeildini, á tel. 55 81 11 ella á elm@trygd.fo.

**SOLEIÐIS ER TRYGD**
TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greidleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 21 fólk, og vit umseta í dag fyri meira enn 90 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

**LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO**
**UMSÓKNARFREISTIN ER 21. APRÍL 2009**

TRYGD
leitar eftir tær.

### Pílagrímsferð við Kristine Hestbech í Føroyum 8. og 9. mai 2009

Nøkur fá pláss eru eftir til pílagrímsferðina, har vit ganga úr Hósvík og tveir dagar seinni koma til Norðradalsskarð. Kristine Hestbech, prestur, sum á ferðini heldur andaktir og gevur okkum nøkur góð orð at hugsa um, meðan vit ganga. Randi Meitil, ferðaleiðari, fer at greiða frá ymiskum søguligum og serligum náttúrufyribrigdum, vit síggja á leiðini.

Hvønn dag ganga vit einar 8 til 10 tímar, íroknað steðgir.

Tilmelding á trekking@olivant.fo

Prísurin fyri hvønn er 1950,- kr.

Við í prísinum er góður matur og gisting í einakamari.

Keypssamtøkan í Hoyvík

### 2 starvsfólk til matstovuna í Hoyvík

**A. Frítíðaravloysari**
Søkt verður eftir frítíðaravloysara at byrja beinan vegin.

**B. Fast starv**
Søkt verður eftir fólki at starvast fast 30 tímar um vikuna at byrja 1. mai.

Nærri fæst at vita við at venda sær til leiðaran, Maud Matras, tel 314149.

**FK Hoyvík**
Att. Maud Matras
Brekkutún 9
Postboks 349
FO-188 Hoyvík

MÁLARAMEISTARI SP/F
Niels Sørensen
TLF. 31 28 46 & 21 88 46
nielss@post.olivant.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo